# Gróthørð kapping um pelagisku rávøruna

**Nú íslendingar hava í hyggju at byggja ídnaðarvirki í Hetlandi, og norðmenn á sama hátt liggja framvið í Írlandi, samstundis sum donsk virkir fáa minni av nebbasild, bendir alt á, at kappingin um svartkjaftin verður gróthørð**

ÍDNAÐARVIRKIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Einki stendur í stað. Tað ger kappingin um pelagisku rávøruna heldur ikki. Bæði íslendingar og norðmenn liggja nú fram við at byggja ídnaðarvirkir í ávikavist Hetlandi og Írlandi.

Íslendsku ætlaninar í Hetlandi eru ikki nýggjar, men liggja helst eini tvey ár afturi í tíðini.

– Hetta er nýtt vín í gomlum fløskum, siga føroyskir eygleiðarar.

Fleiri smærri ídnaðarvirki, sum framleiða mjøl og lýsi, eru í Íslandi, og nú er so æltanin hjá íslendingum at flyta útbúna úr Íslandi niður til Hetlands, um myndugleikarnir har eru sinnaðir at geva rúm fyri einum slíkum virki.

– Vilja tit byggja atløgubryggju og pier, kunnu vit seta eina verksmiðju, sum gevur nógv arbeiði, upp á havnalagnum, tykjast íslendingar siga.

Teir eru "snildir" – sæð í positivum ljósi, og tað eru tey, sum halda, at teir partvís hava í hyggju at gera sær dælt av stuðli, sum ES veitir útjaðaraøkjum.

### Ikki so einfalt

Eygleiðarar í Føroyum, sum kenna til framleiðslu av mjøli og lýsi, halda tó ikki, at íslendsku ætlaninar í Hetlandi eru so einfaldar kortini. Skal eitt slíkt virki verða kappingarført og hava eina líkinda framleiðsluorku, er neyðugt við stórum og dýrum íløgum, sum skulu forrentast.

Sum skilst, ganga íslendsku ætlaninar í Hetlandi ikki sum "smurt breyð", tí ein ávís mótstøða hevur víst seg at vera frá lokalum fólki og umhvørvisfólki.

Í Noregi eru eisini fleiri ídnaðarvirki, sum framleiða mjøl og lýsi, og ætlanin hjá norskum íleggjarum er, at eitt nýtt ídnaðarvirki skal standa upp í Írlandi um eitt ella tvey ár.

Eisini í norsku ætlanini, halda føroyskir eygleiðarar, at talan partvís er um at gera sær dælt av ES-stuðli.

### Hørð kapping

Uttan mun til, hvat liggur aftanfyri ætlaninar hjá íslendingum og norðmonnum í ávikavist Hetlandi og Írlandi, skerst ikki burtur, at kappingin um pelagisku rávøruna kann gerast rættiliga hørð – ja, gróthørð.

Hugskotið um at leggja hesar verksmiðjur í Írlandi og Hetlandi botnar í, at verksmiðjurnar geografiskt koma at liggja væl fyri, tá ið svartkjafturin fyrst í árinum vanliga tekur seg upp har suðuri á leiðini.

– Tað verður stytri hjá skipunum at sigla, og nú oljan er so dýr, hevur hetta sjálvsagt stóran týdning, eins og tað hevur týdning í góðari fiskitíð, sum hendan tíðin er, ikki at missa ov nógva tíð.

Eygleiðarar dylja ikki, at verða íslendsku og norsku ætlaninar framdar, kemur hetta at gera, at kappingin um svartkjaftin kann gerast rættiliga hørð.

– Donsku ídnaðarvirkini koma avgjørt eisini at blanda seg upp í kappingina, nú so lítil nebbasild er at fáa – og hetta vilja norðmenn ikki lata á sær sita.


*Ídnaðarvirkið Havsbrún í Fuglafirði*

*Savnsmynd*


*Tað er her, at íslendingar ætla at byggja ídnaðarvirki í Hetlandi. Samstundis, sum íslendingar hava "følaran" úti í Hetlandi, arbeiða norðmenn við ætlanum í Írlandi*

### Effektiviteturin

At svartkjafturin í størri mun verður kvoteraður, og ein partur av pelagisku fiskasløgunum, eitt nú sildini, verður landaður til matna, kemur eisini at gera sítt til, at áhugin fyri ídnaðarfiskinum, sum fer til mjøl og lýsi, veksur.

– Neyðugt er tí at verða effektivur, um tú skalt standa teg í kappingini, og tað kostar við stórum íløgum, siga føroyskir eygleiðarar.

Sosialurin royndi í morgun at fáa eina viðmerking frá Bergi Poulsen, stjóra á Havsbrún, men Bergur er í løtuni uttanlands.

# Tróndur í Gøtu og Finnur Fríði landað í Fuglafirði


*Christian í Grótinum (mynd) og Norðborg koma væntandi inn at landa fyrsta dagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Eingin munandi svartkjaftafiskiskapur er í løtuni, men skipini leita um ymiskar leiðir**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskiskapurin hjá svartkjaftaskipunum sunnanfyri er nú minkaður burtur í lítið og einki, og nú leita skipini um ymiskar leiðir fyri at vita, um tey kunnu finna nakað.

### Tvær landingar

Tróndur í Gøtu og Finnur Fríði, sum hava roynt á markinum millum Føroyar og Hetland, hava júst landað í Fuglafirði. Annar landaði í gjár, hin í fyrradagin. Skipini høvdu ávikavist 1100 og 2100 tons.

Tróndur í Gøtu og Finnur Fríði komu inn fyri veður, men eftir at tey hava lagt veiðina upp, eru tey nú farin avstað aftur.

Sum skilst, er eingin betýðiligur svartkjaftafiskiskapur í løtuni, men skipini leita um ymiskar leiðir.

Onkur skip eru longur suðuri á leiðini, og onnur leita sunnanfyri Munkagrunnin.

### Inn at landa

Túrarnir hjá Christiani í Grótinum og Norðborg eru nú við at gerast langir.

Skipini hava umleið 500 tons í part, og væntandi er, at tey fara at stevna til lands at leggja veiðina upp ein av fyrstu døgunum.